# Innangarðsútskifting
# í
# Haraldssundi



**Mikudagin 20. apríl 2022 kl. 19 varð útskiftingarfundur settur í bygdarfelagshúsinum Ljósið í Haraldssundi at viðgera mál um innangarðsútskifting í Haraldssundi.**

Umframt nevndina, Olaf í Garði Joensen, Mariu Gregersen og Arnold Thomassen fm. vóru uml. 16 eigarar møttir.



Jógvan R. Frýdal umboðaði Umhvørvisstovuna. Eisini vóru Julianna Húsgarð og Birgitta Eddiesdóttir frá Umhvørvisstovuni og lýddu á.

Tá klokkan var farin av 19 beyð formaðurin fundarfólkinum vælkomnum.

Nú var nakað síðan at fundurin eftir ætlan skuldi haldast, men nú vóru umstøðurnar tíbetur til vildar, so fundurin kundi haldast.

Fram varð lagt:

Skjal nr. 1: Lýsing 1. oktober 2021 í Dimmalætting. Lýst var eisini í Norðlýsinum og Sosialinum.

Lýst varð í svørtutalvu í Kunoy og á heimasíðunum og hjá Umhvørvisstovuni.

31. des. 2021 varð aftur lýst í Dimmu. Lýst var eisini í Norðlýsinum og Sosialinum.



Umstøðurnar gjørdu, at nevndin metti tað ikki var ráðiligt at halda fundin, og í kunngerð, sum varð lisin á døgurða 11. jan. 2022, varð fundurin útsettur til 20. apríl 2022.

Lýst varð aftur í Norðlýsinum, og fundurin varð kunngjørdur á døgurða og á kvøldi 20. apríl 2022.

Uppá fyrispurning, um nakar hevði viðmerkingar til lýsingarháttin, svaraði ongin.

Formaðurin lýsti fundin lógliga lýstan og settan.

Skjal nr. 2: Grannastevnuviðtøkan frá 11. mars 2009 við tilhoyrandi skjølum og góðkend av Búnaðarstovuni 22. desember 2010.

Skjal nr. 3: Skriv frá Umhvørvis- og Vinnumálaráðnum dagfest 2. desember 2019, har Arnold Thomassen er tilnevndur til útskiftingarformann.

<u>Skjal nr. 4</u>: Útskrift úr rættarbókini 26. september 2013, har Olaf í Garði Joensen, á Eiði, og Maria Gregersen, við Matará, í Syðrugøtu verða uppnevnd til nevndarlimir.



Greitt varð frá § 10, har útskiftingarkravið kann takast aftur, um øll, sum atkvøddu fyri útskiftingini á grannastevnu, ynskja hetta.

Formaðurin spurdi, um fundarfólkið ynskti at taka málið aftur. Eins og á grannastevnuni varð einmælt samtykt, at útskiftingin skuldi fremjast, og málið varð ikki tikið aftur.

Habiliteturin varð viðgjørdur. Nevndarlimirnir vita seg ikki vera so nær skyldar ella svágdar við nakran ognara í Haraldssundi, at tað nemur teirra habilitet.

Eingin hevði viðmerking til habilitetin, og er nevndin skipað soleiðis:



Arnold Thomassen, formaður
Olaf í Garði Joensen, nevndarlimur
Maria Gregersen, nevndarlimur

Nevndarlimirnir skrivaðu undir hesa váttan sambært § 5, stk. 2:

*"At eg vil leggja mær eina við og óheftur útinna tær skyldur, sum liggja á mær sum útskiftingarnevnarlimi, tað vátti eg við hond míni undir trúnaðartreytum."*

Nevndin hevur kannað eigindómsviðurskiftini.

Matrikuleringin av Haraldssundi byrjaði 22. juni 1973 og varð endað 18. august 1981. Tá vóru skrásettir 72 lutir.



Innangarðsvíddin í Haraldssundi er uml. 13,4 ha., og herav er Seyðatrøðin er uml. 4 ha.

Í dag eru uml. 90 eigindómar í Haraldssundi við íalt 127 lutum. Tað eru 10 felagseigindómar. Eigararnir eru o.u. 60.

Nevndin metir, at sambært § 2 í útskiftingarlógini er grundarlag fyri útskifting og ásett verður:

**Útskifting innangarðs í Haraldssundi verður at fremja.**

Greitt var frá, at matrikulin og matrikulkortið verða grundarlagið undir útskiftingini, og tí er týdningarmikið at eigararnir kanna, um nakar feilur er í matrikli og matrikulkorti.

<u>Skjal nr. 5</u>: Eigaralistar fyri Haraldssund.

Formaðurin greiddi frá, hvussu skiftið fer fram, og hvør eigaranna lutur í skiftinum er.

## Innangarðsútskifting í Haraldssundi

Greitt varð frá, hvussu umráðandi tað er, at góðskumetingin er røtt, og heitt varð á eigararnar at uppnevna fólk at hjálpa nevndini at býta bygdina upp í øki og áseta góðskuna fyri tey ymisku økini. Góðskumetingin fer fram eftir útskiftingarfundin.

Uppnevnd vóru: Johannes Jacobsen
Brandur í Kongsstovu
Rasmus í Haraldssundi.

Tosað varð eisini um garðahald. Hagapartarnir hava garðahald, og ynskt verður, at tað verður óbroytt.

Eisini var tosað um vetrarbit og landsvegin til Kunoyar.



Í gerðabókini fyri matrikuleringina av markatalsbygdini Haraldssund pag. 540 stendur: "Yvirliggjandi hagi eigur grasningsrættin á undirliggjandi bøi. Hagaparturin Fyri Sunnan eigur sostatt grasningsrættin á bønum í Haraldssundi".

Viðvíkjandi landsvegnum til Kunoyar meinti onkur, at tað var gjørdur sáttmáli við Landsverk, men hvat stendur í honum er óvist. Nevndin kannar málið nærri, áðrenn støða verður tikin til, um landsvegurin skal takast við í skiftið.

Kort og eigaralistar liggja frammi á kommunuskrivstovuni, og skjølini eru eisini tøk á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni: www.us.fo.

Fundurin lokin kl. uml. 20:15.

**Góðskumetingin**



Eftir útskiftingarfundin møttist nevndin við uppnevndu metingarmonnunum í Ljósinum at viðgera høvuðsmetingina innangarðs í Haraldssundi.

Fyri eigararnar møttu Jóhannes Jacobsen, Brandur í Kongsstovu og Rasmus í Haraldssundi, og nevndin møtti fullmannað.

Frá Umhvørvisstovuni møtti Jógvan R. Frýdal.

Grundarlagið at tosa um høvuðsmetið var eitt kort við nýggjastu flogmyndum og dagførdum matrikulkorti.

Menn eru samdir um, at gamli bøurin, Kongsbøur, er mettur at vera besti bøurin. Merkurnar eru nakað verri. Nýggjasta innleggið, sum er sunnast, er grunt og ongin lívd.



Jógvan spurdi um, hvussu góðskan var oman og niðan. Johannes segði, at omanfyri linjuna millum nýggjastu og eldru flúgving passar nokk so væl, og omanfyri linjuna er bøurin verri. Á bríkunum er lítið meiri enn ein sponn av áskoti í erva og dýpist omaneftir. Um Hjallan er vánaligt.

Tikið samanum er best norðast og fellur suðureftir. Ringast er um Hjallan, og best er í neðra.

Veðurforsøgnin lovar gott veður komandi dagarnar, og nevndin fer at ganga um bøin í morgin kl. 9.

Fundurin var lokin kl. uml. kl. 21.





**Metingin og uppmáling**

Hósdagin 21. apríl 2022 kl. 9 møttist nevndin og Jógvan Frýdal við bygdarhúsfelagið Ljósið.



Dagssetningurin var at meta bøin í Haraldssundi.
Fyrst var gingið norður gjøgnum bygdina og suður eftir gøtuni fyri at høvuðsmeta bøin.
Byrjað var frá Ljósinum og um gøtuna og norður gjøgnum bøin og heim eftir vegnum, og endað varð aftur við Ljósið.
Síðan varð byrjað at meta. Lutur fyri lut varð mettur. Onkustaðni varð neyðugt at klúgva lutirnar fyri at fáa eitt rættvíst met.
Liðugt var at meta, tá klokkan nærkaðist 14.

Tá gingið var um bøin sást skjótt, at nógv sæst á flogmyndum, men ikki alt, og tí er neyðugt at koma norður aftur at mála inn. Bøgarðurin, gøturnar og garðar varð neyðugt at mála inn. Eisini skulu brotlinjurnar, har metið í lutunum er ymiskt, málast inn. Fyri ikki nakað skuldi fara í gloymskuna, varð farið norður aftur dagin eftir at mála inn. Nógv var mált inn, nakað restaði í og 26. Apríl varð tað mált inn.

**Olaf í Garði Joensen** **Maria Gregersen** **Arnold Thomassen**









**Týsdagin 22. november 2022 var annar útskiftingarfundur hildin í Ljósinum í Haraldssundi**



Umboðandi nevndina vóru Olaf í Garði Joensen og Arnold Thomassen, fm. Maria Gregersen hevði forfall. Samskift hevur verið við hana umvegis teldupost og telefon. Jógvan R. Frýdal umboðaði Umhvørvisstovuna.

Vátaslettingurin helt ikki haraldssundsfólki aftur, og uml. 20 vóru møtt.

Áðrenn formaðurin fekk boðið vælkomin, hildu fleiri av fundarfólkunum, at væl var lýst. Ja so væl, at tey væntaðu, at Norðlýsið eisini fór at lýsa væl eftir, at fundurin var hildin.




Tá klokkan var farin av 19, beyð formaðurin vælkomin.

Skjal nr. 6 - lýsingin, varð løgd fram. Fundarfólkið hevði givið sera góðar ábendingar um, at fundurin var væl lýstur, og tí metti formaðurin, at fundurin var lógliga lýstur og settur.

So var lagt til brots og greitt varð frá, hvussu góðskumetingin var. Matrikulkortið er teknað upp eftir flogmyndum, tí kunnu vera smærri feilir. Fyri at rætta hesar feilir og betra grundarlagið at býta eftir, eru bøgarðurin og bakkarnir máldir inn, og kortið er rættað samsvarandi. Síðan var greitt frá, hvussu kortið og eigaralistarnir vóru evnað til.

Nú vantaði bara at leggja skjal nr. 7 - góðskumetingarkortið og eigaralistarnar fram, men áðrenn síðsti spenningurin skuldi avdúkast, var gerðabókin lisin.

Síðan var góðskumetingarkortið lagt fram, og fundarfólkið fekk møguleika at hyggja at tí og seta spurningar.

Tosað hevur verið við borgarstjóran í Kunoyar kommunu, Poul Jacob Poulsen, um kommununar møguleika at ognartaka í samband við innangarðsútskiftingina.

Greitt var frá at fundarfólkið hevur møguleika at koma við viðmerkingum til góðskumetingina. Viðmerkingarnar skulu sendast til nevndina á us@us.fo, merkt “Góðskumetingin í Haraldssundi” og vera nevndini í hendi í seinasta lagi 14. desember 2022.

Innkomnu viðmerkingarnar verða viðgjørdar av útskiftingarnevndini, og so verður góðskumetingin latin til kæru. Kærufreistin er tríggjar mánaðir, og tað verður lýst seinni.

Eigararnir kunnu seta fram ynski og senda til nevndina á us@us.fo merkt “innangarðsútskiftingin í Haraldssundi”. Ynskini skulu vera nevndini í hendi í seinsta lagi, tá kærufreistin um góðskumetingina fer.

Góðskumetingarkortið verður lagt á kortal.fo, og eigaralistin og gerðabókin verða løgd á us.fo/utskifting um nakrar dagar. Roynt var at vísa, hvussu ein kundi fáa fatur á korti og eigaralistum. Onki bar til, men við kønari hjálp frá umboðnum av Umhvørvisstovuni bragdaði.

Fundurin var slitin, tá klokkan nærkaðist 21.

**Olaf í Garði Joensen** **Arnold Thomassen, fm.**



**Viðmerkingar til góðskumetingina**
Eftir at freistin at koma við viðmerkingum til góðskumetingina (boniteringina) var farin hevði útskiftingarnevdin móttikið eina viðmerking.


Kunngerð frá
**útskiftingarnevndini fyri Haraldssund**

Útskiftingarnevndin fyri Haraldssund hevur viðgjørt viðmerkingarnar um góðskumetingina av jørðini. Nevndin staðfesti góðskumetingina, ið var løgd fram á útskiftingarfundi í Ljósinum í Haraldssundi 22. novembur 2022 við hesum broytingum:

Matr.nr. 21. Lutur nr. 4, 6 og 11 verða broyttir til 70 %.

Eftir §51 í lóg nr. 147 frá 27. mars 1939 um útskifting við seinni broytingum verður góðskumetingin latin til serskilda ákæru.

Kort og eigaralistar liggja frammi á kommunuskrivstovuni í Kunoy og á Umhvørvisstovuni. Dagførd metkort eru at finna á kortal.fo.

Kærufreistin er 3. mánaðir frá 26. januar 2023 at rokna. Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til:

**Yvirútskiftingarnevndina,**
**Sorinskrivarin, C. Pløjensgøta 1**
**postboks 28, 110 Tórshavn.**

Kærur skulu vera Sorinskrivaranum í hendi í seinasta lagi 26. apríl 2023.

Eigarar hava møguleika at seta fram ynski um hvar teir vilja hava sína jørð lagda.

Ynskini skulu sendast til Útskiftingarnevndina innan 1. mai 2023, Traðagøta 38, postboks 2048, 165 Argir ella á us@us.fo.

N.v.

**Arnold Thomassen**
útsk. form.

Lutirnir norðast í Kongsbønum høvdu fingið lægri met enn grannastykkini. Festarin metti, at metið var ov lágt.

Nevndin og Jógvan Frýdal samskiftu umvegis teldupost og telefon um metið skuldi haldast ella hækka, so at tað samsvaraði grannastykkinum.

Semja var um at hækka metið, soleiðis at stykkini fingu sama met.

Avgerðin varð latin til kæru, og kunngjørt varð í bløðunum og á heimasíðuni hjá us.fo og kunoy.fo. Kærufreistin varð sett til 26. apríl 2023.

Upp á fyrispurning um kært var, svaraði Sorinskrivarin, at tey onga kæru høvdu fingið.

Góðskumetingin er sostatt staðfest og góðkend.

**Ognartøka og fyribilsplanur**
Tað almenna hevur møguleika at ognartaka í samband við útskiftingina, og hendan rætt ynskir Kunoyar kommuna at brúka.


Kunoyar kommuna

KUNOYAR KOMMUNA

Kunoy, 10. juli 2023

**Ognartøkusamtykt**

Í samband við útskiftingina í Haraldssundi hevur Kunoyar kommuna, við heimild í lóg nr. 147 frá 27. mars 1939 Kap. 3, §22, samtykt, at ognartaka niðanfyri økir:

| | | |
|---|---|---|
| 1. Vegabreiðkan av Bakkavegi og Rasmussargøtu | vídd 1113 m² | met 445,7 |
| 2. Gøtan norð á Skarð | vídd 278 m² | met 155,6 |
| 3. Miðgøtan | vídd 805 m² | met 298,1 |
| 4. Skúlin | vídd 108 m² | met 43,2 |
| Samlaða ognartøkan | vídd 2304 m² | met 942,6 |

Kunoy, tann 10/07 2023

Poul Jákob Poulsen, borgarstjóri

Rebekka Rógvadóttir Petersen, skrivari

Nevndin hevur samskift við kommununa um ognartøkuna, og á fundi í Kunoy við borgarstjóran 22. juni varð eitt uppskot um ognartøku gjøgnumgingið. Onkrar smávegis rættingar skuldu gerast, og onkur uppmáling skuldi gerast.

Eftir fundin varð steðgað í Haraldssundi, har tær síðstu uppmálingarnar vórðu gjørdar.

Ætlaða ognartøkan var uppteknað og víddarroknað. Eisini var gjørt upp, hvussu nógv var tikið av hvørjum einstøkum luti.

Kunoyar kommuna samtykti ognartøkuna 10. juni 2023.

**Týsmorgunin 21. november 2023 kl. 10 var útskiftingarfundur settur á Umhvørvisstovuni.**

Nevndin var umboðað av Mariu Gregersen og Arnold Thomassen, fm. Jógvan R. Frýdal umboðaði Umhvørvisstovuna. Brian Hansen frá Umhvørvisstovuni var og lýddi á. Olaf í Garði Joensen hevði forfall. Eftir avtalu verður Olaf kunnaður eftir fundin.

Til viðgerðar var ognartøkan og fyribilsplanurin í Haraldssundi.

Lagt var fyri við at gerðabókin varð lisin.

Síðan var hildið áfram við ognartøkuni. Eftir at bygdin varð matrikulerað, eru Bakkavegur og Rasmusargøta broytt, og fyri nøkrum árum síðan fríðkað ungdómur frá Ung í arbeiði Miðgøtuna. Hvørki vegurin ella Miðgøtan eru broytt á matrikulkortinum, og Kunoyar kommuna heldur, at tað er sjálvsagt at fáa hetta rættað í samband við útskiftingina. Ætlaða ognartøkan er máld inn og víst á skjali nr. 9 - Ognartøka. Ognartøkan er eisini gjørd upp eftir eigarunum, matr.nr. og luta nr. Uppgerðin verður løgd fram sum skjal. nr. 10 - Ognartøkuuppgerð.

Nevndin hevur ongar viðmerkingar til ognartøkuna og er samd um at leggja ætlaðu ognartøkuna fram á komandi útskiftingarfundi.

Næst á skrá var fyribilsplanurin. Á seinasta útskiftingarfundi í Haraldssundi var heitt á eigararnar um at seta fram ynski til fyribilsplanin.

Áhugin tykist stórur. tí seks ynski eru komin inn, og tey umboða uml. 80 % av mettu víddini.

Eitt uppskot til fyribilsplan er snikkað saman, og ynskini vóru lisin upp og borin saman við planinum. Ringt er at gera øllum til vildar, men roynt hevur verið at eftirlíka sum mest.

Semja er at leggja fyribilsplanin fram sum skjal nr. 12 á komandi útskiftingarfundi.

Tá tað nærkaðist middegi varð fundurin slitin.

**Maria Gregersen** **Arnold Thomassen, fm.**

Ávegis til Haraldssunds 23. nov. 2023 kunnaði Maria Gregersen Olaf í Garði Joensen um fyribilsplanin, og tá komið var í Ljósið vórðu ognartøkan og fyribilsplanurin løgd fram fyri honum. Olaf vildi leggja navn til, at skjal nr. 9 - Ognartøkan og skjal nr. 12 - Fyribilsplanur vórðu løgd fram.

**Hóskvøldið 23. nov. 2023 var útskiftingarfundur settur í Ljósinum í Haraldssundi**
Nevndin var fullmannað. Jógvan R. Frýdal umboðaði Umhvørvisstovuna. Brian Hansen frá Umhvørvisstovuni var myndamaður á fundinum.



Veðrið var ikki til vildar hetta kvøldið - nógvur vindur og kavaæl. Kortini høvdu 10 haraldssundsfólk hættað sær á dyr.

Tá klokkan var 19.07 (t.e. kl. 19.00 sandavágstíð) var fundurin settur.

Formaðurin beyð vælkomin, og hildið var á við at leggja skjal nr. 8 - Kunngerð fram. Onkur hevði sæð kunngerðina á Facebook og onkur í blaðnum.



Spurt var, um nóg væl var lýst, og um aðrir betri kunngerðahættir vóru, og aftur her varð víst á kunningarsíðuna, kommunan hevur á Facebook.

Formaðurin lýsti fundin lógliga lýstan og settan.



Tvey mál vóru á skrá. Framløga av ognartøku og fyribilsplani.

Lagt varð fyri við ognartøkuni.
Greitt var í stuttum frá um ognartøku, og um møguleikan at ognartaka í samband við útskifting. Eftir §22 í útskiftingarlógini kann verða ognartikið 2 % av veltum og 4 % av óveltum. Verður farið um hetta mark, er møguligt at ognartaka eftir aðrari lóg.

Kommunan hevur sett fram ynski um at ognartaka 2.304 m², sum er 942,6 m² í mettari vídd. Eftir at hava kannað ognartøkuna metir nevndin, at ognartøkan er innan fyri settu mørk.

Ognartøkan varð víst á korti og løgd fram sum skjal nr. 9 - Ognartøka. Ognartøkan er gjørd upp eftir luta nr., matr.nr. og eigara. Ognartøkuuppgerðin varð løgd fram sum skjal nr. 10 – Ognartøka - uppgerð.

Endurgjaldið fyri ognartøkuna verður ásett av eini metingarnevnd, sí §22.3 í útskiftingarlógini. Vanligt er, at nevndarlimirnir verða uppnevndir til metingarfólk.

Spurt varð, um nakar hevði nakað ímóti at uppnevna Mariu Gregersen og Olaf í Garði Joensen til metingarfólk. Ongin tók orðið, og tí verður heitt á sorinskrivaran um at uppnevna tey til metingarfólk.



Onkrar viðmerkingar vóru um ognartøkuna. Serliga var tað gøtan millum húsini, sum

viðmerkt varð um. Sagt var frá, at gøtan var úr gomlu bygdini og suður á lendingina.

Greitt var frá, at viðmerkingar til ognartøkuna skulu sendast til Kunoyar kommunu á kunoy@kunoy.fo.

Eftir §22.4 í útskiftingarlógini hevur eigari møguleika at ynskja sær endurgjald fyri ognartiknað lendið. Tá fær hann tað minni útlagt. Um so er, skal tað boðast frá á us@us.fo.

Ynskir eigari ikki at fáa endurgjald fyri ognartøkuna, verður ognartikið av felanum. Hesir eigarar minka tá upp til 2 % av veltum og 4 % av óveltum, og endurgjaldið verður við at fíggja útskiftingina.

So var komið til hæddarpunktið á kvøldinum - Framløga av fyribilsplaninum.

Fyrst varð greitt frá, hvussu fyribilsplanurin verður evnaður til. Ynskini verða lisin og sett á kort fyri at fáa greiði á, hvar ynskt verður, og um samanfall eru millum ynskini.
Felagslutirnir, sum skulu upploysast, verða upploystir og eigarans lutur verður lagdur aftur at hansara samlaðu ogn.
Eftir er so at leggja út og fáa greiði á, hvussu nógv hvør einstakur skal fáa lagt út.

Nú er komið frá tanka umvegis ynski til eina linju á kortið. So nú er nakað ítøkiligt at tosa um. Dentur var lagdur á, at hetta er bara ein strika, og enn er ongin marknasteinur settur, og serliga tað ósagda hevur áhuga fyri at fáa ein so góðan plan sum gjørligt.

Fyrst var planurin vístur á uppvørpuni, og so varð eitt petti tikið út fyri at greiða frá, hvussu arbeitt verður. Talgilt er gott, men betri er ein pappírsútgáva, og áðrenn planurin varð lagdur á borðið, varð tikið saman um.

So var planurin lagdur á borðið. Greitt var frá, at ongin hevði fingið øll ynski eftirlíkað, men roynt var, at onkur ynski hjá øllum vórðu gingin á møti.

Planurin varð lagdur á borðið, og haraldssundsfólk kundu nú síggja, hvat nevndin hevði fingið burturúr. Friður var, meðan planurin varð granskaður, og onkrir spurningar komu.
Ynskiligt var hjá onkrum, at onkur linja skuldi flytast, og onkur var ikki heilt nøgdur við, hvar hansara familja var løgd.



Formaður var so spentur at leggja fyribilsplanin fram, at hann hevði gloymt at lesa gerðabókina. At enda var gerðabókin lisin, og tikið var saman um.

Viðmerkingar til ognartøkuna skulu sendast til Kunoyar kommunu á kunoy@kunoy.fo, viðm. til ognartøkuna í Haraldssundi.

Ynskir eigari endurgjald fyri ognartøkuna, skal tað fráboðast á us@us.fo viðm. endurgjald fyri ognartøkuna í Haraldssundi.

Viðmerkingar til fyribilsplanin skulu sendast til us@us.fo viðm. til fyribilsplanin í Haraldssundi.

Freistin at koma við viðmerkingum og ynski um endurgjald er **15. desember 2023**.

Formaðurin takkaði fyri ein siðiligan fund og sleit fundin, tá klokkan var farin av 20.30.

**Olaf í Garði Joensen** **Maria Gregersen** **Arnold Thomassen, fm.**

**Nevndarfundur á Umhvørvisstovuni týsdagin 23. apríl 2024 kl. 14.**

Nevndin var fullmannað og Jógvan R. Frýdal umboðaði Umhvørvisstovuna.

Eittans mál var til umrøðu. Innkomnar viðmerkingar til fyrsta fyribilsplan.

Á útskiftingarfundi í Haraldssundi 23. november 2023 var fyrsti fyribilsplanur lagdur fram, og tá fingu eigararnir møguleika at koma við viðmerkingum. Henda møguleika nýttu fleiri, og 7 viðmerkingar komu til fyrsta fyribilsplanin.

Til vildar øllum kann eingin gera, sum sungið verður. Nevndin var samd um at gera nakrar broytingar, og er nýggjur planur gjørdur.

Nevndin las viðmerkingar og helt tær saman við nýggja planinum.

Eftir at hava tosað um hvørjir møguleikar vóru at broyta fyribilsplanin, var semja um at fremja umtalaðu broytingar og leggja planin fram á næsta fundi í Haraldssundi sum annan fyribilsplan.

Fundurin var slitin, tá klokkan nærkaðist fimm.

**Olaf í Garði Joensen** **Maria Gregersen** **Arnold Thomassen, fm.**

## Innangarðsútskifting í Haraldssundi

**Á Hálvársøku 2024 varð útskiftingarfundur í Ljósinum í Haraldssundi.**



Nevndin var fullmannað. Jógvan R. Frýdal umboðaði Umhvørvisstovuna og Brian Hansen frá Umhvørisstovuni var myndamaður.

Luttøkan var góð. 23 haraldssundsfólk vóru komin á gátt.

Tá klokkan var farin av 19 setti formaðurin fundin.

Lagt var fyri við at leggja skjal nr. 13 - kunngerð fram. Hesaferð er bara kunngjørt á ymiskum heimasíðum - hjá Norðlýsinum, Kunoyar kommunu, Umhvørvisstovuni og ymiskum síðum á Facebook.



Kunngerðin var eisini sett í gluggan í Ljósinum.

Formaðurin spurdi um kunngerð og kunngerðahátt. Ongin tók orðið, og tí lýsti formaðurin fundin lógliga lýstan og settan.

Eittans mál var á skrá. Framløga av øðrum fyribilsplani.

Á seinasta fundi, tá millum annað fyribilsplanurin var lagdur fram, var heitt á eigararnar í Haraldssundi, um tey høvdu viðmerkingar til planin, at senda tær til nevndina.



Sum áður nevnt vóru fleiri, sum nýttu henda møguleika. Nevndin gjørdi tí ein nýggja plan.

Áðrenn planurin varð lagdur á borðið, rundaði formaðurin av við at greiða frá, at planurin verður lagdur á kortal.fo. Gerðabókin, skjal nr. 14 - annar fyribilsplanur og skjal nr. 15 - útlegg, verða løgd á heimasíðuna hjá Umhvørvisstovuni.

So var tann formligi parturin av fundinum lokin, og annar fyribilsplanurin varð lagdur á borðið.

Lítil ivi var um, at haraldssundsfólk vóru spent at síggja, hvat úrslit nevndin nú var komin fram til.
Eins og til fyrsta plan var eisini rós og rís til annan fyribilsplan. Eftir ráðum frá Jógvan R. Frýdal heitti formaðurin á eigararnar um at stinga høvdini saman og so koma við uppskotum til møguligar broytingar. Einstaklingar eru sjálvandi eisini vælkomnir at koma við viðmerkingum til annan fyribilsplan. Fleiri spurningar vórðu settir, og eftir besta førimuni varð svarað.



Tað sagda orðið er gott, men fyri at betra planin kann tað ósagda orðið vera betri. Tí verður heitt á eigararnar í Haraldssundi um at koma við viðmerkingum til annan fyribilsplan í seinasta lagi **29. mai 2024.**

Fundurin var slitin, tá klokkan nærkaðist 20, og seinastu fólk fóru av gátt, tá klokkan nærkaðist 21.

**Olaf í Garði Joensen** **Maria Gregersen**
**Arnold Thomassen, fm.**



**Hósdagin 27. nov. 2024 kl. 10 varð útskiftingarnevdnarfundur settur á Umhvørvisstovuni**

Nevndin var fullmannað.
Jógvan R. Frýdal og Brian Hansen umboðaðu Umhvørvisstovuna.

Fyri á fundinum vóru ognartøkan og meting av ognartøkuni og gjøgnumgongd av plani.

Fyrst varð gerðabókin lisin.

So var farið undir at tosa um ognartøkuna og endurgjald fyri ognartøkuna.
Greitt varð í stuttum frá endaligu ognartøkuni í Haraldssundi. Serlig ónøgd var um at ognartaka gøtuna frá gøtuni norð á Skarð og suður á lendingina. Kunoyar kommuna gjørdi av at taka gøtuna burtur úr ognartøkuni. Kortið og víddirnar eru rættaðar og eru grundarlag fyri metingini.

Sorinskrivarin hevur uppnevnt nevndarlimirnar Olaf í Garði Joensen og Mariu Gregersen til metingarfólk.

Tá mett varð, gingu nevndarlimirnir gjøgnum Haraldssund, og tí varð mett, at tað ikki var neyðugt at fara á staðið fyri at meta um ognartøkuna.

Tað finnast ikki nógv tøl um keyp og sølu av innangarðsjørð í Haraldssundi. Tær sølur, vit kundu finna fram til, vórðu lagdar fram. Sølurnar, sum vit hava tøl á, eru frá ávikavist 1995, 2003 og 2012.
Eisini var hugt eftir "Kunngerð um umsiting av landsjørð", seinast broytt 3. juli 2013.Her er Haraldssund í bólki 4.

Metingarnevndin tosaði um, hvussu metast skuldi. Eitt endurgjald fyri velt og eitt fyri óvelt, ella eitt endurgjald fyri ognartikna lendið, og hvat skuldi liggja til grund fyri meti kunngerðin ella seinastu sølurnar. Maria gjørdi vart við, at umrødda kunngerð hevur sín uppruna í 2007, og prísurin ikki er broyttur síðan tá.

Tosað var eisini um aðrar bygdir, har ognartikið var í samband við innangarðsútskifting.

Metingarnevndin var samd um, at eitt endurgjald skuldi latast fyri mist lendi, og endurgjald skuldi latast fyri mist bit og onki verður latið fyri mista fóðurframleiðslu. Endurgjald fyri mist lendi verður 70 kr./m² og endurgjaldið fyri mist bit verður 4,80 kr./m².

Síðan var farið undir at gjøgnumganga innkomnu viðmerkingarnar til annan fyribilsplan.

Nevndin hevði móttikið tvær viðmerkingar, og roynt hevur verið at tillaga planin, soleiðis at flestu ynski eru gingin á møti.
Planurin varð samanhildin við innkomnu ynskini. Onkrar smávegis broytingar eru.Tær flestu broytingarnar eru gjørdar í samstarvi við eigararnar ella umboð fyri eigararnar.

Nevndin er samd um at hetta verður tann endaligi útskiftingarplanurin.

Endaligi útskiftingarplanurin verður lagdur fram á fundi í Haraldssundi móti vári.

Fundurin var slitin kl. 11.30.

**Olaf í Garði Joensen** **Maria Gregersen** **Arnold Thomassen, fm.**

**Kaldliga hóskvøldið 13. mars 2025 kl. 19 var endaligur útskiftingarfundur settur í Ljósinum í Haraldssundi.**

Nevndin møtti fullmannað, og Jógvan R. Frýdal umboðaði Umhvørvisstovuna.

Á skránni; framløga av metingini av ognartøkuni og endaliga útskiftingarplaninum.

Formaðurin beyð fundarfólkinum vælkomnum og byrjaði við at leggja skjal nr. 16 - Kunngerð fram.

Kunngjørt hevur verið á heimasíðunum hjá Kunoyar kommunu, Norðlýsinum og Umhvørvisstovuni. Spurt var um lýsing og lýsingarhátt, og tá ongin mótmælti, lýsti formaðurin fundin lógligа lýstan og settan.

Gerðabókin varð lisin.



Síðan varð metingin av ognartøkuni løgd fram.

Ognartøkan er framd við heimild í Útskiftingarlógini § 22, og mett verður eftir “Lov om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne”, vanliga nevnd 1881 lógin.

Metingarnevndin er tveymannað, og Sorinskrivarin hevur uppnevnt nevndarlimirnar Olaf í Garði Joensen og Mariu Gregersen til metingarfólk. Sí skjal nr. 18 - Uppnevning av metingarfólki.

Kunoyar kommuna hevur samtykt at ognartaka nakað til vegbreiðkan, Miðgøtu og víðka skúlaøkið. Sí skjal nr. 17 - Endaliga ognartøkan.



Metingarnevndin var samd, at endurgjaldið verður 70 kr./m² og endurgjaldið fyri mist bit verður 4,80 kr./m². Sí skjal nr. 19 - Meting av endaligu ognartøkuni.

Metingin kann kærast til Sorinskrivaran innan 3 mánaðir.

Nú sást á øllum brøgdum, at fólk vóru spent at síggja tann endaliga útskiftingarplanin, men so lætt sluppu tey ikki. Greitt var frá, at síðan seinasta plan hevði nevndin fingið

tvær viðmerkingar. Bygdarfólkið hevði tikið við ráðum frá Jógvan R. Frýdal og høvdu sett seg saman at koma við einum samlaðum broytingaruppskoti. Uppskotið var so mikið gott, at bara einstakar broytingar skuldu gerast.

Sjálvt um klokkan á vegginum ikki hevði flutt seg ein tumma ótolnaðust fólk. Endaligi útskiftingarplanurin varð vístur á uppvørpuni. Talgilt er gott, men betri er, tá kortini verða løgd á borðið. Tí var skjal nr. 20 - Eigaralisti til endaligan útskiftingarplan, og skjal nr. 20 - Endaligi útskiftingarplanur løgd á borðið.

Eftir at fundarfólkið hevði kannað endaliga útskiftingarplanin eina løtu, var planurin gjøgnumgingin lut fyri lut.

**Ymisk eigaraviðurskifti**
Kannugil verður skrásett sum litra B. - almennn á.



Hjallurin norðanfyri Glyvursá verður fluttur frá matr.nr. 14a til matr.nr. 14c

Luturin í matr.nr. 17 verður fluttur frá matr.nr. 16 til matr.nr. 17

Luturin norðanfyri matr.nr. 20b og luturin sunnanfyri matr.nr. 20b verða fluttir frá matr.nr. 2 til matr.nr. 20b.

Tvey eigaraviðurskifti eru ógreið. Matr.nr. 6 - eigari Íshúsið og matr.nr. 36 - eigari Tarvafjósið.
Haraldssund varð matrikulerað í 1981. Tá gjørdi Kunoyar kommuna krav um Íshúsið. Hetta krav varð ongantíð staðfest. Upplýst varð, at Kunoyar kommuna brúkar og hevur brúkt Íshúsið.
Kunoyar kommuna verður skrásett sum eigari av matr.nr. 9.

Tarvafjósið. Nú er long tíð síðan, at felags tarvur hevur verið í Haraldssundi.
Matr.nr. 36 - Tarvafjósið verður upployst og býtt út til markatalið.

**Upploysing av felagslutum.**
Hesir felagslutir eru upploystir:
Matr.nr. 4 - Seyðatrøðin
Matr.nr. 36 - Tarvafjósið
Matr.nr. 39 - Geilin
Matr.nr. 43 - Glyvursmørk
Matr.nr. 44 - Flatamørk
Matr.nr. 45a - sf. Kannugil
Matr.nr. 46 - Niðara Stóradeildsmørk
Matr.nr. 47 - Skriðumørk
Matr.nr. 48 - Ovara Stóradeildsmørk
Matr.nr. 49 - Sunnara Miðdeildsmørk
Matr.nr. 50 - tillegg til Flatumørk
Matr.nr. 51 - Suður við Garð
Matr.nr. 54c - neystalutur

**Matr.nr. 26a**
Eftir umbøn frá eigarunum av matr.nr. 26a verður matr.nr. broytt soleiðis, at 1/3 verður fluttur til matr.nr. 1 - eigari Brandur Klettskarð í Kongsstovu. Svanhild Rasmussen og Hildigarð Jacobsen verða einsamallar eigarar av matr.nr. 26a.

**Byrðar (servituttir)**
Ferðslurætturin yvir matr.nr. 11a, 14b og 26a verður strikaður

Tinglýsti servitutturin á matr.nr. 9 strikast
Tinglýsti servitutturin á matr.nr. 17 strikast
Tinglýsti servitutturin á matr.nr. 32 - nr. 2 broytast
Tinglýsti servitutturin á matr.nr. 32 - nr. 3 búrættur strikast

**Nýggir servituttir**
Á matr.nr. 27a.
Matr.nr. 14a hevur ferðslurætt yvir matr.nr. 27a, soleiðis sum endaligi útskiftingarplanurin vísir.
Á matr.nr. 53.
Matr.nr. 11a og 20a hava ferðslurætt yvir matr.nr. 53, soleiðis sum endaligi útskiftingarplanurin vísir.
Á matr.nr. 11a.
Matr.nr. 20a hevur ferðslurætt yvir matr.nr. 11a, soleiðis sum endaligi útskiftingarplanurin vísir.
Á matr.nr. 31
Matr.nr. 3 og 35 hava ferðslurætt yvir matr.nr. 31, soleiðis sum endaligi útskiftingarplanurin vísir
Á matr.nr. 3
Matr.nr. 35 hevur ferðslurætt yvir matr.nr. 3, soleiðis sum endaligi útskiftingarplanurin vísir.
Á matr.nr. 5
Matr.nr. 7 hevur ferðslurætt yvir matr.nr. 5, soleiðis sum endaligi útskiftingarplanurin vísir.
Á matr.nr. 6
Matr.nr. 30 hevur ferðslurætt yvir matr.nr. 6, soleiðis sum endaligi útskiftingarplanurin vísir.
Á matr.nr. 11d
Matr.nr. 32 hevur ferðslurætt yvir matr.nr. 11d, soleiðis sum endaligi útskiftingarplanurin vísir.
Á matr.nr. 20a
Matr.nr. 8, 29 og 37 hava ferðslurætt yvir matr.nr. 20a, soleiðis sum endaligi útskiftingarplanurin vísir.
Á matr.nr. 14c
Gøtan oman á Støð skal liggja órørd og opin fyri almennari ferðslu, sum endaligi útskiftingarplanurin vísir. Kunoyar kommuna hevur átalurætt.
Á matr.nr. 24
Gøtan oman á Støð skal liggja órørd og opin fyri almennari ferðslu, sum endaligi útskiftingarplanurin vísir. Kunoyar kommuna hevur átalurætt.
Á matr.nr. 25
Gøtan oman á Støð skal liggja órørd og opin fyri almennari ferðslu, sum endaligi útskiftingarplanurin vísir.



**Frágreiðing um nýggju markini**
Nýggju markini verða avmerkt við niðurgrivnum steinum við íklinkaðari koparskivu merkt "MARK". Har marknasteinur ikki er settur, verður koparskivan klinkað beinleiðis í klettin, í betong- ella grótgarð.

Vegirnir eru yvirhøvur avmerktir við træpelum, har toppurin er málaður reyður. Í túni, har træpeli ikki fæst niður, verður jarnrør nýtt sum marknamerki. Hvørt mark er í minsta lagi avmerkt við tveimum merkjum, eitt í hvørjum endanum. Inn frá vegi (oftast 2 m) verður marknamerki sett. Har talan er um longri mark, verða ein ella fleiri steinar settir ímillum. Øll brot í markinum verða avmerkt.

Eru grannarnir samdir um at grava grøv eftir markinum, kunnu teir taka marknasteinarnar burtur, um teir eru samdir um, at grøvin er mark, og báðir eru hjástaddir, tá ið arbeiðið verður gjørt.

Tann, sum við vilja flytur ella oyðileggur tey merki, ið niðursett eru undir útskiftingini, verður sektaður við bót og verður sjálvur at bera útreiðslurnar av at seta markini aftur av nýggjum.

Álagt verður Umhvørvisstovuni, so skjótt sum gjørligt, at seta øll mark, og um neyðugt at ávísa eigarunum, hvar markini eru.

**Viðvíkjandi víddunum eftir útskiftingina**
Tær nýggju víddirnar frá útskiftingini eru sambært víddarrokning, eftir at markini eru sett. Tí kann munur vera á víddunum frá matrikuleringini, har eigindómarnir eru skrásettir eftir loftmyndum, og útskiftingini, har markini eru sett á staðnum.

**Umhvørvisstovan førir roknskapin fyri útskiftingina**
Álagt varð Umhvørvisstovuni at gera roknskapin upp.

Allar góð- og skuldskrivingar, sum t.d. endurgjald fyri ognartøku, ið eru fastlagdar við úrskurði undir skiftinum verða gjørdar upp í sama skjali.

Greitt varð frá býtinum av kostnaðinum millum Umhvørvisstovuna (landskassan) og eigarafelan – víst verður til útskiftingarlógina kap. 10.

Nevndin ásetur, at eigaranna partur av útreiðslunum, ið hava staðist av útskiftingini, verður býttur út á eigindómarnar (matr.nr.) eftir virðismetingini, tó soleiðis, at minsta gjald fyri eitt matr.nr. verður kr. 500.

Øki, ið ikki eru fevnd av útskiftingini, gjalda einki.

Vanligt er, at eigararnir fáa nýggju lutirnar til brúks, tá útskiftingin endar. Tó kunnu teir ikki krevja endurgjald fyri íløgur og nýtslu, sum møgulig yvirútskifting hevur við sær.
Tá spurt varð um nakar mótmælti, at nýggja jørðin verður tikin í nýtslu beinanvegin, mótmælti eingin.

Eigararnir fáa nýggju lutirnar til brúks beinanvegin við omanfyristandandi treyt um broyting við møguligari yvirútskifting.

Tiltøk - stik, turkiløg v.m. - hevur eigarin rætt at flyta, og skal hetta vera gjørt innan 14. juni 2025.

Útskiftingin kemur í gildi, tá 3 mánaðir eru farnir frá í dag at rokna.

Áðrenn úrskurðurin var sagdur spurdi formaðurin nevnd og fundarfólk um tey komu nakað til hugs, sum var gloymt, tí “Onki sum er merkt av mannahond er lýtaleyst”. Ongin hevði nakað at leggja afturat.

**Úrskurður**
Ásett verður, at útskiftingin kemur í gildi 14. juni 2025.

Útskiftingin við tilhoyrandi skjølum verður latin til ákæru, og er kærufreistin 3 mánaðir frá 13. mars 2025 at rokna. Víst verður til kap. 9 í útskiftingarlógini (Lóg nr. 147 frá 27. mars 1939 við seinni broytingum).

Útskiftingarskjølini - kort og eigaralisti - liggja frammi á Umhvørvisstovuni á Argjum, á heimasíðuni www.us.fo og á kommunuskrivstovuni í Kunoy, til kærufreistin er úti.

Møgulig kæra skal vera skrivlig og stílast til

**Yvirútskiftingarnevndin**
C. Pløyensgøta 1
Postboks 28
110 Tórshavn.

Úrskurðurin lisin.

Útskiftingin endað.

Nevndarinnar vegna takkaði formaðurin fyri álitið og áhuga, sum vístur hevur verið.

Tá klokkan nærkaðist 20.30 var fundurin lokin.

**Kæra**
Eftir kærufreistin var farin 14. juni 2025 varð spurt hjá Sorinskrivaran um Yvirútskiftingarnevndin hevði fingið nakra kæru.

Á Jóansøku boðaði Sorinskrivarin frá at ongin hevði kært.

**Úrskurðurin er staðfestur, og útskiftingin er endað.**